# Stórir listamenn hava pinkuframsýning í Lítluvík

*Teir teljast millum stóru listamenn okkara og ofta seta vit teir í samband við stórar málningar. Men í dag lata teir upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík við smáum myndum*

DAGFINN OLSEN

Amariel Norðoy, Kári Svensson og Eyðun av Reyni lata nú upp framsýning í Smiðjuni Lítluvík.

Teir 3 húsast allir dagliga í bygninginum, har Frants Restorff hevur barkarí. Har hava teir á hvør síni hædd arbeiðshøli síni.

Nú hava teir gjørt av at sýna fram saman, men talan er ikki um vanliga framsýning, tí hugskotið er serstakt.

Hóast teir eru millum størstu nøvnini innan nútíðarlist okkara, so gjørdu teir av at hava eina framsýning við smáum myndum.

**Hugskotið**

Amariel hevði nakrar myndir, ið hann nevnir skravumyndir. Tær eru málaðar á lítlar og ofta avlangar plátur. Síðani er skravað í, fyri at fáa formin fram og ávirkan.

Har hómast Nólsoyggin, Kúrberg og Vestaravág.

Eyðun hevur gjørt nakrar málningar, sum ikki eru so øgiliga stórir og Kári sýnir fram myndir, har hann hevur lagt olju á pappír og handlitað litografi.

Ein dagin, teir starvaðust í hølunum hjá Restorff, fall prátið á lítlu myndirnar, og hugskotið um framsýning kom fram.

**Náttúrulýsingar**

Felags fyri allar myndirnar hjá Kára, Amariel og Eyðuni er, at tær eru náttúrulýsingar.

Skravumyndirnar hjá Amariel hava myndevni sum land og fjørður ella morgun.

Eyðun málar ikki ávíst motiv, men heldur er tað spennandi vetrarljósið og ljósskiftið, sum hugtekur hann.

- Pappírsmyndirnar tykjast onkrum at mynda okkurt kinesiskt tekin, sigur Kári skemtandi, men eisini her eru náttúrulýsingar og tað er ljósið, ið hevur givið íblástur.

Sýningin í Smiðjuni í Lítluvík við lítlu myndunum hjá stóru listamonnunum er opin tann 12. og 13. februar frá klokkan 15 til 19.



*Amariel Norðoy, Kári Svensson og Eyðun av Reyni lata nú upp framsýning við smáum myndum*
Mynd: Jens Kristian Vang

# Nýggjar barnabøkur og sangbók

*Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tvær barnabøkur og endurútgvið Starabókina, sum upprunaliga kom í 1965*

DAGFINN OLSEN

„Nert og føl kettlingin“ er bók til smærru børnini, ið er sansamennandi.

Í bókini úr pappi, kunnu børnini kenna og kína mjúka skinninum, hvøssu tunguni ella merkja hørðu skálina og ruflutu kurvina.

Óivað eitt gott gávuhugskot til børn, ið annars eru ovurviðkvom fyri kettuhárum.

Pauli Hansen týddi bókina úr enskum.




**Álvur**

Enn ein bók í røðini um Álv er komin. „Lumpar tú pápa tín, Álvur“.

Heimskendi 5 ára gamli Álvur vil sleppa at spæla við amboðskassan hjá pápanum.

Hvussu skal hann fáa pápan at spæla við seg, og ikki bert sita og lesa í einum blað.

Børn og vaksin kenna seg aftur í søgunum um Álv. Fleiri flimir eru eisini um Álv.

Niels Jákup Thomsen hevur týtt bókina, sum er í litum og við stívari permu. Hon er 28 blaðsíður.

**Starabókin**

Sámal Petersen og J. Símun Hansen, lærarar í Klaksvík, løgdu fyrstu útgávuna av „Sangbók til Skúlabrúks“ tilrættis.

Hon kom í 1965. Fridtjof Joensen teknaði staran á permuni, ið gav bókini navnið „Starabókin“. Sami stari er enn á permuni.

Onnur økta útgáva kom í 1989. Knút Olsen skipaði fyri sangunum, sum eru afturat í 2. útgávuni. Regin Debess prýddi við smámyndum. Bókin hevur verið vælumtókt og hevur verið útseld.

Nýggja útgávan er endurprent av av 2. útgávuni.

Í Starabókini eru 78 sangir, eldri og nýggjari. Í bókini finna vit mangar av kendastu barnasangum okkara.









# Aldurin fyri barnarfrádrátt hækkaður

JOHN JOHANNESSEN

Seinasta málið, ið var til triðju og endaligu viðgerð á tingfundinum í gjár, var tingmáli nummar 44/1999, ið var uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti. Uppskotið legði Kristian Magnussen vegna Javnaðarflokkin fyri tingið 20. januar.

Uppskotið hevði til endamáls at hækka aldurin fyri barnafrádrátt, so foreldur kunnu fáa frádrátt í skattinum fyri børn síni, til tey fylla 18 ár. Frammanundan er frádráttur bert veittur, til børnini fylla 16 ár.

Uppskotið varð samtykt undir aðru viðgerð á tingfundinum týsdagin og fór sostætt samtykt til triðju viðgerðar. Við atkvøðugreiðsluna undir aðru viðgerð fekk uppskotið 29 atkvøður fyri, onga ímóti og onga blanka.

# Skráseting av motorakførum samtykt

JOHN JOHANNESSEN

Tingmál nummar 43/1999, sum var uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum við meira var eitt av málunum, ið endaliga skuldi avgreiðast á tingfundinum í gjár.

Uppskotið, sum Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, legði fyri tingið 21. januar, varð samtykt undir aðru viðgerð á tingfundinum seinasta týsdag við 28 atkvøðum fyri, ongari ímóti og ongari blankari.

# Kolvetnisskattalógin samtykt

*Kolvetnisskattalógin kom samtykt til triðju viðgerðar á tingfundinum í dag*

JOHN JOHANNESSEN

Sokallaða kolvetnisskattalógin varð samtykt við triðju viðgerð á tingfundinum í gjár, har fýra mál skuldu endaliga avgreiðast við triðju viðgerð.

Fyrsta av teimum fýra triðju viðgerðinum var av tingmáli nummar 28/1999, sum var uppskot til løgtingslóg um álíkning, innkrevjing, eftirlit og annað í sambandi við skatting av inntøku av kolvetnisvirksemi. Hetta uppskot varð lagt fyri tingið av Karsteni Hansen, fíggjarmálaráðharra, 22. desember í fjør. Uppskotið verður eisini kallað kolvetnisskattafyrisitingarlógin.

Uppskotið varð samtykt við broytingum við 28 atkvøðum fyri ongari ímóti og ongari blankari undir aðru viðgerð á tingfundinum týsdagin og kom soleiðis samtykt til triðju viðgerðar á tingfundinum í dag.

# Skatligar avskrivingar samtyktar

JOHN JOHANNESSEN

Uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar við meira, sum Annfinn Kalsberg, løgmaður, legði fyri tingið 21. januar, varð undir aðru viðgerð á tingfundinum týsdagin samtykt við 28 atkvøðum fyri, ongari ímóti og ongari blankari. Sostætt, fór uppskotið, sum er tingmál nummar 41/1999, samtykt til triðju viðgerðar.

Á tingfuninum í gjár var hetta sama mál til triðju viðgerð, har tað varð endaliga samtykt.

# Enn eitt incestmál í rættinum

JOHN JOHANNESSEN

Í gjár var grundlógarforhoyr fyri dupult læstum durum í Føroya Rætti. Sum Sosialurin skilir, er talan um enn eitt álvarsamt mál, har skyldfólk hava verið ónærislig móti børnum.

Uni Vestureið, kriminalovasti, vil ikki gera nakrar viðmerkingar til málið, men tó váttar hann, at kriminalløgreglan hevði eitt álvarsamt mál fyri í rættinum í gjár fyri dupult læstum durum.

Ábendingar eru um, at talan er um eitt mál, ið løgreglan brádliga er komin fram á.

Fyri stuttum varð eitt par dømt tvey ára langa fongsulsrevsing fyri at hava verið ónærislig móti egnum børnum. Tey kærdu bæði dómin fyri landsrættin, og sita tey nú varðhaldsfongslað, meðan bíðað verður eftir, at landsrætturin fær stundir at viðgera málið.

# Thorbjørn Jagland gerst ikki aftur forsætisráðharri



*Thorbjørn Jagland*

OSLO: JÓGVAN HUGO GARDAR

Thorbjørn Jagland, sum hevur staðið á odda fyri norska Javnaðarflokkinum síðani Gro Harlem Brundtland legði frá sær, boðaði seinnapartin ígjár frá, at hann ikki longur er floksins boð uppá ein komandi stjórnarleiðara.

Thorbjørn Jagland letur nú uppí hendurnar á Jens Stoltenberg at føra flokkin víðari í Stórtinginum. Tað var seinnapartin hósdagin ikki klárt, um Jens Stoltenberg tekur yvir, men tað er lítil ivi um, at so verður. Jens Stoltenberg er sera vælumtóktur millum norskar veljarar.

Thorbjørn Jagland segði á einum tíðindafundi í gjár, at hann framvegis ynskir at halda fram sum floksformaður, og at hann fegin heldur fram í hesum sessinum aftan á landsfundin í november í ár.

Jens Stoltenberg gertst formaður fyri tingbólkin hjá norska Javnaðarflokkinum áí Stórtinginum og er eisini floksins boð uppá ein komandi stjórnarleiðara frá Arbeiderpartiet.

Nær Javnaðarflokkurin aftur kann gerast stjórnarflokkur er í løtuni óvist, men fleiri mál eru á veg, sum kunnu fella stjórnina.

Fyrsta stóra málið er sokallaði nýggi teldubýurin á Fornebu, har ein meiriluti í Stórtinginum er ímóti loysnini hjá stjórnini. Hetta málið verður viðgjørt í løtuni, og avgerðin fellur í mars.

HEIMA BIO




Wild Wild West
kemur týsdag




The Faculty

VIDEOTOP 10

VIKA 6

1 Arlington Road
2 The Waterboy
3 Når godtfolk kommer til byen
4 Forces of nature
5 Bride of Chucky
6 Familie terapi
7 Universal Soldier
8 Mumien
9 Lokkeduen
10 Notting Hill

| | |
|---|---|
| Í Gundadali | tel. 31 47 70 |
| Í Kollafirði | tel. 42 10 83 |
| Í Saltangará | tel. 44 91 33 |
| Í Klaksvík | tel. 45 73 53 |
| Í Sørvági | tel. 33 20 01 |
| Í Leirvík | tel. 44 33 60 |
| Í Skálabotni | tel. 44 12 00 |

STATOIL

støðirnar kring landið